# Mazda bilarnir – komu higar fyri 35 árum síðan

**Flestu bilmerkir í Føroyum eru komin gjøgnum danskar bilainnflytarar, men soleiðis er ikki við Mazda, ið komu higar í 1967. Vit fingu Mazda bilarnar áðrenn bæði danir og íslendarar**



*Fyrstu Mazda bilarnir, ið komu á marknaðin í 1931, vóru í roynd og veru motorsúkklur á 3 hjólum við last*



*Í 1960 kom fyrsti Mazda persónbilurin á markaðin. Mazda R360 við 2 sitiplássum*

BILAINNFLUTNINGUR
*Magnus Gunnarsson*

Japanska maskinverksmiðjan, Toyo Cork Kogyo, ið seinni koma at gera Mazda bilarnar, bleiv stovnað í Hiroshima í 1920 av Jujiro Matsuda. Fyrstu Mazda bilarnir, ið komu á marknaðin í 1931, vóru í roynd og veru motorsúkklur á 3 hjólum við last. Í 1940 vóru teir klárir við einum persónbili við 4 hjólum, men tá brast annar heimsbardagi á, og hendan ætlanin bleiv av ongum. Eftir kríggið helt framleiðslan av teimum 3-hjólaðu bilunum fram. Í 1960 kom fyrsti Mazda R360 persónbilurin á marknaðin.

### Til Føroyar í 1967

Í 1967 komu fyrstu Mazda bilarnir til Føroyar, talan var um Mazda 1500. Bilurin, ið var teknaður av Bertone í Italiu, var fyrstu ferð sýndur fram á eini bilaframsýning í Tokyo í 1965, og kom á marknaðin árið eftir. Um hetta mundið komu eisini teir fyrstu Mazda 1200. Bilarnir vóru innfluttir beinleiðis úr Japan. Mazda útflutningurin til USA byrjar í 1970, og árið eftir koma teir til Danmarkar.

Fyrsti Mazda við Wankelmotori, Cosmo Sport, varð gjørdur í 1967, við loyvi frá týsku NSU bilverksmiðjuni. Í 1971 kom Mazda RX-2, ið hevði sama karossarí sum Mazda 616, á marknaðin. Hetta varð fyrsti bilur við Wankelmotori í Føroyum.

Seinastu 35 árini hava tað verið óteljandi sløg av Mazda bilum í Føroyum í øllum støddum, frá smáum og stórum persónbilum til vørubilar, pick-up og minibussar. Bilverksmiðjan skiftið í 1984 navn frá Toyo Kogyo til Mazda Motor Corp. Ford eigur í dag ein góðan triðing í Mazda.



*Í 1967 komu fyrstu Mazda bilarnir til Føroyar, talan var um Mazda 1500, ið var teknaður av Bertone í Italiu. Bilurin á myndini er ein Mazda 1800*



*Mazda RX-2 frá 1971 var fyrsti bilur í Føroyum við Wankelmotori*




*Lýsing frá Berg Motors í 1972. Mazda 1800 sedan og Mazda 818 stationcar*

ítróttur
Nr. 159 • hósdagur • 22. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hoyvíkshøllin tikin í nýtslu leygardagin



*Leygardagin verður so loksins Hoyvíkshøllin tikin í nýtslu*
*Mynd: Savnsmynd*

**– Nýggja høllin fer at fáa ómetaliga stóran týdning fyri trivnaðin í H71, sigur formaðurin í H71, Andras Poulsen**

HONDBÓLTSHØLL
*Páll Holm Johannesen*

Leygardagin verður so loksins høllin í Hoyvík ella Hoyvíkshøllin sum hon eitur tikin í nýtslu. Upprunaliga var ætlanin, at høllin skuldi verða klár longu í fjør, men hetta miseydnaðist, og tí er høllin seinkað eitt ár. Úr Hoyvik verður sagt, at leygardagin verður eitt lítið hátíðarhald, nú høllin verður klár at taka í nýtslu

Umboð fyri Tórshavnar Býráð og H71 fara at flyta fram røður leygardagin, og eisini fer stjórin í Hoyvíkar Skúla, Petur Dahl, at siga nøkur orð. Aftaná hátíðarhaldið verður ein dystur millum H71 og KÍF.

Ætlandi er hondbóltsfelagið hjá kollfirðingum, KÍF, eisini búleikast í høllini hjá hoyvíkingum í vetur. Umframt at venja har, fer KÍF eisini at leika sínar heimadystir í Hoyvíkshøllini. Hetta verða sostatt triðja høll, sum kollfirðingar fara at leika í. Síðstu árini eru bæði høllirnar á Skála og Vestmanna nýttar.

Afturat honbóltfeløgunum H71 og KÍF, fer fimleikafelagið Ljósi eisini at hava sínar venjingartímar í høllini hjá hoyvíkingum í vetur.

### Hoyvíkshøllin ómetaliga stóran týdning

– Høllin kemur at fáa ómetaliga stóran týdning fyri trivnaðin í H71 í framtíðini

So avgjørdur er formaðurin í H71, Andras Poulsen, um nýggju høllina í Hoyvík, sum verður tikin í brúk leygardagin

Andras Poulsen sigur frá, at seinastu mongu árini, hevur H71 verið noytt til at taka til takkar við teimum tíðunum í høllini á Nabb og Gundadali, sum hini ítróttafeløgini í Tórshavnar Kommunu ikki hava skoytt um. Hetta hevur, sambært formanninum í H71, havt við sær, at meginparturin av venjingunum hjá felagnum hava ligið langt út á kvøldi, og tað hevur verið stak óheppið.

– Vit hava havt tíðir frá klokkan níggju á kvøldi, og úteftir, og tað ein ikki framhaldandi bjóða limunum í H71, og tí kemur Hoyvíkshøllin avgjørt í tøkum tíma, greiðir formaðurin í H71 frá

H71 hevur umframt høllina á Nabb og Gundadalshøllina, eisini nýtt fimleikahøllina í Hoyvíkar Skúla, og hóast felagið er fegi um teir tímarnar, tað hevur fingið, so hava venjingarumstøðurnar seinastu árini hjá H71 ikki verið av teimum bestu.

Spurdur, um hvønn týdning høllin hevur fyri Hoyvíksbygd, svarar Andras Poulsen, at hann vónar, at felagið kann bjóða ungdóminum í felagnum tryggari karmar, tí sum áðurnevnt, so koma venjingartíðirnar at liggja væl betri fyri, nú nýggj høll verður tikin í nýtslu.

– Felagið hevur ikki altíð havt so gott orð á sær, men hetta er broytt seinastu árini, og við nýggjari høll, skuldu vit avgjørt havt betri møguleika fyri at fáa ungdómin at støðast betri í felagnum, sigur Andras Poulsen

Umframt ungdómin, so væntar Andras Poulsen, at høllin eisini fer at hava við sær, at flaggskipið hjá felagnum, 1. lið, fer at fáa betri úrslit. Andras vísir at enda á, at onkrar vetrar hevur 1. lið verið noytt at vant í høllini Vestmanna, og tað er ikki bestu umstøður at bjóða bestu leikarunum í felagnum.

## H71 sett ungdómsvenjara

UNGDÓMSVENJARI
*Páll Holm Johannesen*

Hoyvíkingar fara rættiliga at brynja seg út í vetur. Umframt nýggja høll, so hevur felagið nú eisini sett venjara, sum skal taka sær av ungdómsliðunum burturav.

Talan er um Sverra Jacobsen, sum seinastu vetrararnar hevur staðið á odda fyri 1.liði hjá H71, men sum í vetur fer at taka sær av teimum ungu í felagnum.

Arbeiðsuppgávan hjá Sverra verður at leggja ungdómsvenjarunum lag á, og at samskipa ungdómsdeildina hjá H71 betur. Úr Hoyvík verður sagt, at Sverri er dugnaligur venjari, og at felagið er sera fegið um at hava fingið so royndan venjara til ungdómsdeildirnar.

Avgerðin at seta ein ungdómsvenjara, er gjørd við tí fyri eyga at geva ungdóminum í Hoyvík tryggari karmar, og at dygdin í hondbóltsvenjingini verður so høg sum gjørligt.

Eisini vóna tey í H71, at betraðu viðurskiftini í ungdómsdeildunum, fara at hava við sær, at enn fleiri børn í Hoyvík fara at spæla hondbólt í felagnum.

### Niels Viggo til H71

Í síðstu viku varð greitt, at Uni Wardum skal venja 1. manslið hjá H71 í vetur, og nú hevur Uni so fingið Niels Viggo Niclassen úr Kyndli við sær. Umframt Niels Viggo, so hevur málverjin Petur Magnusson eisini vátta, at hann fer at verja málið hjá hoyvíkingum í vetur.

Leiðsan í H71 leggur eisini aftrat, at tað er væl møguligt, at aðrir nýggir leikarar verða at síggja í felagnum í vetur, men enn er onki ítøkiligt komið burturúr.

Frá í liðnum í fjør, hevur H71 mist tríggjar leikarar. Bjarni Wardum er farin til Danmarkar í lestarørindum, Finnur Hansson spælir í Kyndli í vetur, meðan Kristian Petursson fer aftur at spæla fyri strandingar.

# Jugoslavi til Neistan

**Neistin missir heili seks leikarar frá liðnum í fjør, og hevur tí leita sær styrk úr Jugoslavia**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Eftir ætlan skal ein jugslaviskur bak-spælari spæla við Neistanum í vetur. Úr Neistanum verður sagt, at hann kemur til Føroya um vikuskiftið, og tá skulu so síðstu smálutirnir fáast uppá pláss.

### Missa týðandi leikarar

Neistin missir fleiri týðandi leikarar frá liðnum, sum í fjør vann silvur bæði í lands- og steypakappingini.

Kollfirðingurin Heini Joensen fer til Danmarkar í lestrarørindum, og Hans Áki D. Christiansen er farin aftur í Kyndil. Tað gjørdist eisini greitt í farnu viku, at Petur Magnusson heldur ikki verður í Neistanum, tí hann fer at leika við H71 í vetur.

Ári Rouch og Karl Oddmar Rasmussen verða heldur ikki at síggja á liðnum í ár, tí báðir verða staddir uttanlands komandi árið. Tað tykist eisini sera óvist, um John Petersen fer at spæla hondbólt í vetur, og tískil verður talan um, at fleiri profilar frá í fjør, sum ikki vera við í ár.

Tað er tí onki undarligt í, at Neistin hevur leitað sær styrk uttanlands, og úr Neistanum siga tey, at tað, tey hava sæð á sjónbandi av nýggja jugoslavanum, boðar frá, at hann avgjørt verður ein styrkur fyri Neistaliði í vetur.

### Beiggi Brian Nielsen venur í Neistanum

Seinastu dagarnar hevur eisini verið hoyrt, at beiggi ein navnframan danskan boksara, hevur vant við Neistanum. Talan skal verða um beiggja kenda boksaran Brian Nielsen, sum dagliga starvast á marinustøðini í Mjørkadali. Beiggi Brian, Jesper Nielsen, er málverji, og hevur spælt hondbólt á høgum støði í Danmark, men hetta er fyri nøkur ár síðan. Tað er tó ikki talan um nakran sáttmála millum Jesper Nielsen og Neistan.